Lýsingartorgið

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
✓ **privatar lýsingar**
✓ **í mesta lagi 40 orð**
✓ **bert ein lutur í hvørjari lýsing**
✓ **hægsta søluvirði 20.000 kr.**

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
✓ **frá fyritøkum og virkjum**
✓ **fleiri enn 40 orð**
✓ **søluvirði oman fyri 20.000 kr.**

tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
50,- kr. + MVG hvørja ferð:
✓ **lýsingar undir teigunum:**
»Dansur«, »Fundir« og »Matur«
✓ **Bill. merktar**

Akfør

BAKLYGT
Vinstra baklygt til Mazd 323 GLX árg. 1989 ynskist til keyps. Hevur tú eina at selja mær?
Tlf. 448097

BILTAKBOYLAR
í sera góðum standi, til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 319190

BILUR TIL SØLU
ein Nissan Sunny, hevur 4 píkadekk undir og 4 summardekk á felgum fylgja við.
Tlf. 315711

BILUR YNSKIST
til keyps, 7-10 ár, fyri ein sámuligan prís.
Tlf. 317865 ella 282165

BILUR YNSKIST
til keyps, 7-10 ár fyri sámuligan prís.
Tlf. 317865 ella 282165

CITROEN XSARA
TD st.car frá mai 1999, til sølu vegna flyting. Vælhildin, summardekk á sportfelgum og fløguspælari fylgja við. Vinarliga ringið á tlf. 422594 eftir kl. 20

DAIHATSU CHARADE
Reyður, árg. ´88, aut. gear, sýnaður í 01.2000. Til sølu fyri 15.000 kr.
Tlf. 321570

DEKK TIL SØLU
Góð brúkt radial dekk til sølu, stødd 175/70 R13.
Tlf. 315437

DEKK TIL SØLU
185/65 14". Fýra summardekk, lítið brúkt, til sølu.
Tlf. 310341

DEKK TIL SØLU
4 dekk við felgum og skálir til Toyota HiAce árg. 2000, koyrt ca. 50 km
Tlf. 216464

DIESEL VØRUVOGNUR
Mitsubishi L. 400, árg. ´98, koyrt 37.000 km. Til sølu fyri 120.000 kr.
Tlf. 284021 eftir kl. 18

DYNAMO
og gearkassi ynskist til Nissan Sunny 1.4 árg. 89.
Tlf. 445044 ella 444378

HONDA CIVIC
1.5i, árg. 3/96, hevur koyrt 80.000 km. Nýlakeraður, sportfelgur fylgja við. Prísuppskot 100.000 kr.
Tlf. 444458

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Leikur	❑ Lutaseðlar
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út- & sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi

Sent hevur:

Navn: .....

Bústaður: .....

Bygd/býur: .....

Tlf.: .....

»Lýsingartorgið«
Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki

FEGLUR
4 stk. 14" felgur til Ford Escort, ynskjast til keyps.
Tlf. 361180, eftir kl. 20

CITROEN
Saxo 1.1i árg. 6/96, koyrt 56.000 km til sølu fyri 70.000 kr.
Tlf. 221717

FELGIR TIL SØLU
15" TSW alu felgir, 5 egern, passa til allar Frod, Peugeot og nakrar Citroen + Audi 80-100. Prísur 1500 kr. Tlf. 220744

FORD GRANADA 23L
lítið brúktur Granada frá ´85, sýnaður í ´99 til sølu.
Tlf. 317578

FORD SIERRA
árg. 84, til sølu fyri kr. 5.000.
Tlf. 332551

HONDA CIVIC
1.5 GL, árg. 87, bíliga til sølu. Bilurin sær gott út og koyrir væl.
Tlf. 319655 ella 220303

JEEPUR YNSKIST
Jeepur við setrum ynskist bíliga til keyps.
Tlf. 211232

MAZDA 626
2,0 i 16V, árg. nov. ´92, hvítur. 2 dekk, stødd 185/65 fylgja við. Hevur píkadekk undir. Til sølu.
Tlf. 444696 ella 288696

MAZDA 626
2.0 árg. 85, heilur ella sum eykalutur. Mazda 626 2.0 árg. 85 hatchb. til sølu. Minstaboð 4.000 kr.
Tlf. 210007 aftaná kl. 18

MAZDA 626 LX
Hatchbck 2,0 við skaða til sølu. Árg. ´85.
Tlf. 445173 eftir kl. 18

MOTORUR YNSKIST
til Toyota Corolla CE 80 (Diesel árg. uml. '84).
Tlf. 442181

NISSAN PATROL
styttra model, til sølu fyri 12000 kr.
Tlf. 318368

NISSAN PATROL
stutta modelli 3,3 Turbo Diesel bíliga til sølu. Og ein Nissan Patrol langa modelli fylgir við, góður til eykalutir.
Tlf. 221160

NÝGGJUR
bilur verður seldur við stórum avsláttri vegna flyting. Renault Mégane, st.car. 1.6 16V 110 hk. Bilurin er einans 3 mór. gamal og hevur nógva eykaútgerð.
Tlf. 316181 ella 343414

NÝTT BAKSETUR
til Toyota Land Cruiser HjZ 80 til sølu. Trygdarbeltli fylgir við. Søluprísur 6.000 kr.
Tlf. 210298

OPEL CORSA
árg. 97, koyrt 38.000 km, sera vælhildin, til sølu fyri 75.000 kr.
Tlf. 318906

SPÆL TIL JEEP
til sølu. 24 V. Trekkraft ca. 1800 kg. Ikki brúkt. Nýprísur 9.000 kr. Søluprísur 6.000 kr.
Tlf. 210298

FELGIR TIL SØLU
Fýra felgir til Mazda 323 til sølu.
Tlf. 444378

SUMMAR OG VETRARDEKK
Good Year Q UG 400 til sølu.
Tlf. 314103

SUMMARDEKK
Fýra nýggj Dunlop summardekk 175/65 x 14 til sølu fyri 1.800 kr.
Tlf. 315556
aftaná kl. 19

SUMMARDEKK
Bridgestone summardekk, rímiliga góð dekk 185R 14C, til sølu.
Tlf. 312604
ella 212504

SUZUKI SWIFT
árg. 87, gráur, hevur bert koyrt 125.000 km. Bilurin er í ógvuliga góðum standi. Hann stendur hjá Bilasøluni Øssur Johannesen. Prísur: 15.000 kr.
Tlf. 321617

TIL SØLU
Góð líti brúkt summardekk 165/80-13.
Tlf. 312604
ella 212504

TOKULYKTIR
Eitt sett av tokulyktum framman, til Citroen Xantia I, ongantíð nýttar, til sølu.
Tlf. 423341

TOYOTA COROLLA
Reyður Corolla árg ´97, koyrt 53.000 km, til sølu.
Tlf. 317578

TOYOTA CAMRY GLI
árg. 86, krevur ábøtur, til sølu fyri kr. 15.000.
Tlf. 317127 aftaná kl. 17

TOYOTA CARINA
1,6 XLI hatchback, við elsóltak, sentrallás. Frá nov. 91, hevur koyrt 86.000 km, 4 felgur við píkadekkum fylgja við.
Ring 312441 ella 212441

TOYOTA CARINA 2.0
Ein Toyota Carina 2.0 XLI Touring, árg. 10/92, koyrt 115.000 km, sóltak, sportfelgur, cd-spælara, í góðum standi.
Tlf. 314463 ella 282921

TOYOTA CELICA
1.6 GTI, árg. 88 við stórum skaða, til sølu.
Tlf. 441284

TOYOTA COROLLA
árg. 88, 1.6 GTI, til sølu, nýsýnaður, hevur sportfelgur.
Tlf. 447451 ella 448373

VETRARDEKK TIL SØLU
Nýggj lamell/píkadekk, flest allar støddir, til sølu.
Tlf. 282691/317691

VW JETTA TX
gráur, árg. 5/87, 170.000 km, ein eigari, vælhildin, kr. 25.000,-
Tlf. 317484 ella 284345

Amboð

EIN
hydrauliskur rotorur til grabba (5 tons) árg. 98, sum nýggjur.
Tlf. 281478 ella 312779

Arbeiði

ALT STOYPIARBEIÐI
verður gjørt, so sum garðar, havaarbeiði, útgrevstur.
Tlf. 281218
ella 316373

AU PAIR TIL ÍSLANDS
Íslendsk familja, sum hevur búð í Føroyum seinastu trý árini, flytur núftur til Íslands, til Mosfellsbær, tætt við Reykjavík. Vit ynskja eina føroyska au pair. Børnini eru 5, 2 og 1/2 ára gomul og ganga í barnagarð aftaná døgurða.
Tlf. 317738

SØKT VERÐUR
eftir fólki til útróður við M/b Arnasteini úr Kaldbak.
Tlf. 448055

TILBOÐ
ynskist uppá innrættan av kjallara.
Ring 315040,
best eftir kl. 17

Barnaútgerð

BABYLIFT
Blá vælviðfarin babylift við motivum á, bert brúkt til eitt barn, til sølu fyri 300 kr. Nýprísur 800 kr.
Tlf. 319460,
Ann-Mari

BABYSITTARI
2 ára gamal, til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 317738

BARNAÚTGERÐ
Brúktur myrkabláur Brio barnavognur + nýtt blátt regnslag til sølu fyri 1.000 kr. Myrkablátt og ternur babtlift fyri 300 kr. og høgur barnastólur, kann brúkast sum stólur og borð, fyri 300 kr.
Tlf. 312393

BARNAVOGNUR
Ein sera væl viðfarin myrkabláur Silver Cross barnavognur til sølu.
Tlf. 457735 ella 456480

BRIO
koyristólur, 2 ára gamal, til sølu.
Tlf. 317738

BRIO KOYRISTÓLUR
Hvítur Brio koyristólur við kalesju, hevur stór hjul, til sølu fyri 2000 kr.
Tlf. 441802

TIL SØLU
ein sera væl viðfarin barnavognur av merkinum Odder, keyptur í sep. ´99. Ring tlf. 455810
ella 456489

Barnaansing

GENTA SØKIST
at ansa 1 ára gomlum tvíburðum í 3–4 mór. frá 1. apríl.
Tlf. 319787
ella 217473

KONA/GENTA
Søkt verður eftir konu/gentu at ansa 9 mór. gomu Bjørg, mánadag/fríggjadag frá kl. 8-17.
Tlf. 318031

Bátaútgerð

6 MANNAFAR TIL SØLU
Frambygdur Kaldbaksbátur til sølu, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 444174

BAKKI
og bb. síða úr glasfipur, av 20 tons útróðrarbáti, 3 alu. kassar L 136 H 100 B 60 cm., bíliga til sølu.
Tlf. 216697

GLASTREVJABÁTUR YNSKIST
til keyps. Stødd: 22-24 føtur. Kostnaður: 40-50 túsund kr.
Vinarliga ringið 314434, Henning

Bingo

BÁRU EYDNUHJÓL
á Fossanesi leygarkvøldið 1. apríl frá kl. 20–24. Tú kanst vinna, lomb, páskaegg, fartelefonir, kjøt, dukkuvognar, súkklur, troyggjur, dukkur, bilar, karamellir, sodavatn og mangt annað t.d, uttanlandsferðir til Íslands. Høvuðsvinningur á lutaseðli sum verður drigin kl. 24, er ein Jau, Jau ferð til Íslands. Vælkomin.
Báran

BASARUR
Basarurin sum lýstur varð at vera 1. apríl, verður ístaðin leygardagin 6. mai í samkomuhúsinum í Sumba.
Sumbiar Ítróttarfelag

BINGO
sum lýst er at verða í skótahúsinum onsdagin 29. mars, verður í staðin tórsdagin 30. mars kl. 19.30 í Framtíðini.
K.F.U.M skótarnir í Vági

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði hósdagin tann 30.3. kl. 19.30. Kom og styðja flogbóltin.
ÍF flogbóltur

BINGO
verður í Framtíðini mánad. 3. apríl og mánad. 1. mai kl. 19.30. Onnurhvør full pláta 300 kr., onnurhvør dupult rekkja 200 kr. 15 góðir lutir á lutaseðli fyri 5 kr. seðilin.
Vágs Matmøðrafelag

EYDNUHJÓL
til frama fyri Skálan verður leygardagin 15. apríl kl. 19.
Klaksvíkar Dansifelag

FRÁ EYDNUNI
Gott páskabingo verður sunnudagin 2. apríl kl. 16. Full pláta 400 kr., á lutaseðli gávukort á 1000,- 2 á 500. Eykaspælið 1800 kr. Drigið verður millum spølini.
Eydnan

GOTT BINGO
verður í Bygdarhúsinum í Hósvík sunnudagin 26. mars. kl. 16. Nógvir góðir vinningar. 12 plátur 100 kr. Drigið verður millum spølini. Eykaspælið nú gávukort á 1.500 kr. 10 lutir á lutaseðlinum. Øll eru vælkomin.
Bygdarfelagið Varðin

GOTT BINGO
í Pállstovu hósdagin 30. mars. kl.19. Gávukort á 500. kr.til fulla plátu. Drigið verður millum spølini. Høvuðsvinningur á lutaseðlinum vikuskiftisferð. 15 plátur 100 kr.Eykaspæl verður.
Kyndil

GOTT PÁSKABINGO
verður í TB-húsinum leygardagin 1. apríl kl. 17.00. Høvuðsvinningur á lutaseðli 2x500 kr. Annaðhvørt bingo 300 kr. og annaðhvørt 1/2 krov. Eykaspæl verður eisini.
Tvøroyrar Bóltfelag

GOTT PÁSKABINGO
Gott páskabingo verður í Bygdarhúsinum í Hósvík leygarkvøldið 8. apríl kl. 19. Nógvir góðir vinningar so sum páskaregg, páskakurvar, døgurðamatur og gávukort. 10 lutir á lutaseðlinum. Høvuðsvinningur á lutaseðlinum gávukort á 1000,00 Kr. Øll hjartaliga vælkomin
Bygdarfelagið Varðin

PÁSKABINGO
EB-Streymur. Árliga páskabingo verður í Eydnuni á Oyrarbakka 2. páskadag.
EB-Streymur

PÁSKABINGO
í Stórhøll leygadagin tann 1. apríl kl. 17 í Fuglafirði.
Áhugafelagið í Fløtugerði

STUÐLAFELAGIÐ GLOTTIN
hevur gott bingo í Pállstovu leygardagin 1. apríl kl. 15. Full pláta 400 kr. + síðuvinningar, drigið millum spølini, 15 vinningar á lutaseðlunum m.a. 2 gávukort á 1.000 kr. í olju og 2 vikuskiftisferðir til Danmarkar. 15 plátur 100 kr. Koyring heim.
Stuðlafelagið Glottin

STUÐLAFELAGIÐ GLOTTIN
Hevur gott bingo í Pállstovu hvørt mikukvøld kl. 19. Full pláta 500 kr. + síðuvinningar. Drigið verður millum spølini, 15 vinningar á lutaseðlinum m.a. 4 gávukort á 500 kr. og 1 á 1.000 kr. 15 plátur 100 kr. Eykaspæl og koyring heim.
Stuðlafelagið Glottin

Burturm. / funnið

BURTURMIST
Blankt ur, burturmist í, ella uttanfyri badmintonhøllina leygarkvøldið 18. mars. Hevur tú funnið tað. Vinarliga ring tlf. 421585

BURTURMIST
Motorola Flare NMT mobiltelefon, í grønum leðurhylki, burturmist hósdagin 16.3. í Havn.
Tlf. 316333

BURTURMIST GULLARMBAND
Gullarmband er burturmist í Tórshavn í vikuskiftinum 6.-7. mars. Møguligur finnari biðist ringja
tlf. 314346

LYKIL BURTURMISTUR
Lykil av merkinum ‚ruko' burturmistur. Festur at gulum spjaldri. Finningarløn verður givin
Tlf. 313471

MAPPA
við FR-korti og koyrikorti í horvin leygarkvøldið 18.3. í Havn.
Tlf. 316763
Jógvan Jacobsen

SVARTUR
mannfólka leðurjakki burturmistur í Kagganum 3.3. Ringið tlf. 311966 eftir kl. 17

Býli

1 1/2 VERILSIS
møblerað íbúð í Keypmannahavn til leigu fram til 1. juli 2000.
Bill. mrk. 804035

ER TAÐ NAKAR
ið kann leiga okkum eina íbúð í Keypmannahavn í døgunum 26. mai til 5. juni? Ring 316686,
Brynhild Danielsen

FELAGIÐ FØROYAR-CUBA
Vit eru aftur í hølistrupulleikum. Hevur nakar eitt lítið høli til felagsvirksemi, so sig okkum frá sum skjótast á
tlf. 313016 ella 312098

HALLÓ TIT
Ung genta søkir íbúð í Tórshavn áðrenn 1. mai. Eg havi fast arbeiði og fari væl um. Max. leiga 3.000 kr. Tlf. 310619 ella 373335

HEVUR TÚ HÚS
ella íbúð í Havn sum tú kundi hugsa tær at býtt um við eina 4-rúms nýmótans íbúð mitt í Árhus, ella hevur tú hús ella íbúð í Havn sum tú kundi hugsa tær at leiga til okkum í 1–2 mór. í summar. Vit eru eini tilkomin hjún, vit hvørki roykja ella drekka. Og vit fara væl um, so ring
fax og tlf. +45 86125554

HÚS Í SANDAVÁGI
Lítil fitt hús til sølu um nóg høgt boð fæst. Loft við skráveggi, miðhædd + kjallari. Hvør hædd ca. 35 kvm.
Tlf. 220854

HÚS Í VESTMANNA TIL SØLU
Hús miðskeiðis í bygdini (við høvuðsveg) til sølu. Stórt grundøki og sera gott útsýni.
Tlf. 424666

HÚS TIL LEIGU
Hús á Glyvrum til leigu, ikki roykjarir hava fyrimun.
Tlf. 0045 74134157
ella 448246

HÚS TIL SØLU
Húsini á Rættargøtu 5 í Klaksvík til sølu.
Tlf. 457752 eftir kl. 19

HÚS TIL SØLU
Eini sethús í Trongisvági til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 315437 ella 321803

HÚS TIL SØLU
Hús í Miðvági til sølu. Ringið og hoyri nærri.
Tlf. 0045 87509232

HÚS TIL SØLU!
Hús í friðaligum umhvørvi í miðbýnum í Tórshavn til sølu um hóskandi boð fæst.
Ringið 220425 eftir kl. 18

HÚS/ÍBÚÐ
Par við tveimum børnum ynskir hús/íbúð í Kollafirði skjótast gjørligt.
Tlf. 421432 ella 284432

HØLI TIL LEIGU
til skrivstovu ella forrætning (fyrr FC Búðin)umleið 100 km.
Tlf. 315438

ÍBÚÐ
ynskist á Argjum til friðarligt par.
Tlf. 314906, eftir kl. 18

ÍBÚÐ ELLA HÚS
Íbúð ella lítið hús ynskist til leigu í Havn ella nærhendis pr. 1. august.
Tlf. 327113 ella 327110,
Jacoba Thomsen

ÍBÚÐ ELLA KAMAR
Íbúð ella gott kamar ynskist til leigu í Havn, Hoyvík ella Argjum.
Ringið 221252

HÚS TIL SØLU
Húsini Undir Klakki 47 í Klaksvík til sølu.
Tlf. 457286

ÍBÚÐ Í HIRTSHALS
til leigu í styttri ella longri tíð í tíðarskeiðnum 15. mai til 15. sept.
2000.
Bill. mrk. 799938

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
1 ver. møblerað íbúð í Keypmannahavn til leigu fram til 1. juli 2000.
Bill.mrk. 803035

ÍBÚÐ Í KEYPMANNAHAVN
ynskist. Vit ynskja at leiga/framleiga eina íbúð í Keypmannahavn í aug., sept., okt., møgulig aí býti við íbúð í Havn.
Tlf. 316164

ÍBÚÐ TIL LEIGU
Stór íbúð, køkur, stova, 5 kømur, til leigu á Argjum. Prísur: 6.000 pr. mánað við vita. 1 mánaðarleiga í depositum.
Tlf. 443045 ella 283041

ÍBÚÐ YNSKIST
Friðarligt par við 8 ára gomlum soni ynskja íbúð í Havn ella nærhendis frá 1. juli. Vit fara væl um, roykja ikki og eru góður gjaldarir. Vinarliga ringið til:
(0045) 86 74 15 72,
31 51 09 (aftaná kl. 16)
ella send e-mail til:
bgw@post5.tele.dk

ÍBÚÐ/KAMAR
Íbúð ella kamar ynskist til leigu í Tórshavnar kommunu.
Ringið 448001

KONTÓR
við goymsluhøli ynskist til leigu í Tórshavn.
Tlf. 317865 ella 282165

KONTÓR
við goymsluhøli ynskist til leigu í Tórshavn umráðnum.
Tlf. 317865 ella 282165

KONTÓR
við goymsluhøli ynskist til leigu í Tórshavn.
Tlf. 317865 ella 282165

SKÁLAVÍK
Nýggjari frítíðarhús til leigu, sum standa væl fyri við útsýni yvir bygdina og víkina. Allir vanligir hentleikar eru í húsinum, sum eisini hava sentralhita.
Tlf. 311197
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~debes
E-postur:
debes@post.olivant.fo

TRÚGVANDI KVINNA
søkir hús/íbúð í Tórshavnar kommunu frá ca. 15. juli ella 1. august 2000.
Tlf. 310279

UNG GENTA
søkir íbúð í Havn! Gjarna lítil og skirvislig, møguliga bíliga eisini, tað ger einki. Bara eg havi eitt kamar at sova í, wc & bað og ein køk, so eri eg glað. Havi fast starv, depositum eingin trupulleiki.
Tlf. 318863
ella 312625, Sóley

Dansur

DANSUR Í VÁGS HØLL!
Góður dansur við danska bólkinum Claus & Servants verður í hollini í Vági fríggjakvøldið 31.3.
VB

Dýr

AKVARIUM
Við pumpu og hitalikami til sølu
Tlf. 314103

AKVARIUM
við ymiskum tilhoyri til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 447783

BORDER COLLIE
hundahvølpur av góðum seyðahundaslag fæst við at ringja
447610

BURTURMISTUR KETTLINGUR
Okkara lítli kettlingur er horvin úr Sornhúsgøtu, við Gripsvegin. Hann er gráur/tikarastríputur og er bert 3 mór. gamal. Hann bleiv burtur mánamorgunin. Vinarliga ring til okkara um tú hevur sæð hann.
Tlf. 318606

EIN SERA
fittur hundahvølpur, svartur og hvítur, verður latin djóravini.
Tlf. 457955

HAMSTARABÚR
1 stórt hamstarabúr (3 hæddir) og 1 minni (2 hæddir) til sølu.
Tlf. 314454

HESTUR TIL SØLU
12 ára gamal íslendskur hestur til sølu.
Tlf. 211789

HUNDAHVØLPAR
Tveir hundahvølpar, 9 vikir gamlir, vera latnir djóravini.
Tlf. 310190 ella 221488

KETTA
Av tí at eg eri flutt út á bygd og mín snjóhvíta ketta ikki vil flyta við, má eg royna at finna ein annan eigara til hana. Hon er 4 ár, ógvuliga fitt og spøk, og aktar hampuliga væl, so er hon eisini reinlig, sleppir hon ikki út, pissar hon í vaskið. Hon er ikki so glað fyri lítil børn, so tað hevði verið best, um hon fekk eitt eldri par at búgva hjá. Hon er von við at vera inni um dagin og úti um náttina. So manglar tær onkran at eta morgubreyð saman við, so ringið til Perlu, á
tlf. 286680
ella aftaná kl. 21 421521

KETTAN
hjá okkum hvarv 27. februar. Hon er hvít undir búkinum og annars svørt, grá og reyð sprøklut. Hon hevði svarta reim við gráari strípu og klokku um hálsin. Hava tit sæð hana, vinarliga ringið
tlf. 316964

KETTLINGAR
Fittir kettlingar fáast við at avheinta teir.
Tlf. 317852
eftir kl. 17

TIL SØLU
Undulátar til sølu.
Tlf. 314434

TVEIR
dvørgahamstrarar við búri og leikum til sølu vegna flyting, matur og annað fylgir við.
Tlf. 424055
kl. 17-21, Margith

UNDULÁTAR
til sølu fyri 200 kr.
Landavegur 21. A.

VOV!
Vit søkja feriufamilju til okkar tvær tíkar, sum eru ógvuliga góðar í sær. Best er um tit búgva frítt, á leiðini Havnar – flogvøllur, og eru von við hund. Hava tit kjallara, ella fjós, kunnu tær møguliga vera har. Økonomiskt blíva vit samd.
Tlf. 319032 ella 316386

Fundir

ÁRSAÐALFUNDUR
hjá Tórshavnar Bátafelag verður í hølum felagsins mánadagin tann 17. apríl kl. 19.30. Skrá samb. lógum felagsins. Vinarliga minnist til limagjaldið.
Nevndin

AÐALFUNDURIN
hjá Argja Róðrarfelag verður í neystinum mánadagin 3. apríl kl. 19.00. Skrá sambært lógini.
Argja Róðrarfelag

EYSTUROYAR SJÁLVST.YRISFE
Ársaðalfundur felagsins verður í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum mánadagin 3. apríl kl. 19.30.
Nevndin

FELAGIÐ SKIPATING
Ársaðalfundur felagsins verður hósdagin 4. mai 2000. Tíð og stað verður lýst seinni.
Nevndin

KLAKSVÍKAR DANSIFELAG
Aðalfundurin verður sunnudagin 9. apríl kl. 20 í Skálanum. Skrá samb. lógum felagsins.
Nevndin

Húsarhaldstól

DEFEKT KØLISKÁP
»Hoover«, 5 ára gamalt, ongantíð brúkt, std. d. 55 cm, b. 55 cm, l. 140 cm, herav 30 cm. av longdini er frystiskáp. Kann avheintast, við nøkrum rustplettum ovast á.
Tlf. 2837446 ella 318858

KOMFÝRUR
Voss komfýrur til sølu, 8 ár, er í góðum standi og sær gott út, 1500 kr.
Tlf. 314329

KØLISKÁP
av merkinum Gorenje – new line, til sølu fyri einans 500 kr. vegna flyting. Tað er 4 ár og std. b 50 cm, l. 1,10 cm, d. 53 cm. Herav er 26 av longdini frystari.
Tlf. 318858 ella 283746

KØLISKÁP TIL SØLU
Eitt miðal køliskáp til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 441448

LÍTIL BAKAROVNUR
við rist og skuffu. Til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 321617

VASKIMASKINA
av slagnum Candy C 836 xt, til sølu fyri einans 1000 kr. vegna flyting. Hon er 4 ár.
Tlf. 283746 ella 318858

Innbúgv

DUPULTHURÐ
»Fronsk« dupulthurð, 12 rútar í hvørjari. Hædd 210 cm. breið 120 cm. til sølu fyri 2500 kr.
Tlf. 372199

EFTIRLÝSING
er tað nakar sum hevur eitt radio frá 60-70 inum at selja mær, vinarliga ring
tlf. 319613

GAMALT SKÁP
(ikki klædnaskáp) til sølu.
Ringið 314384

KOYGGJUSONG
frá Ikea við madras, skrivibORð og rutsjibana. Prísur: 1500 kr.
Tlf. 310490

KURVEMØBLER SÆLGES
2 personers, 2 stole samt 1 glasbord 500,-
Tlf. 319868

KØKSBORÐ
Eitt 3 ára gamalt køksborð (1,60 m. møguleiki er at leingja til 2,0 x 1,0 m.) og fýra køksstólar til sølu.
Tlf. 317738

LÍTIÐ BRÚKT
hvítt baðikar, 170 x 70 cm, við frontplátu til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 314404

ETAGUSONG
Etagusong ynskist til keyps.
Tlf. 310962 best eftir kl. 17

REOLSYSTEM
mahognylitað, tríggjar sektiónir við skuffum og skápum, sera væl viðfarið, kr. 2.000,-
Tlf. 311670

SJÓNVARPSBORÐ
Lútað sjónvarpsborð kr. 350,-. Svart sjónvarpsborð kr. 150,-. Køksborð, hornabonkur og tveir stólar úr ljósum træ, kr. 1.400,-
Tlf. 315556 aftaná kl. 19

SOFABORÐ
við svartari grótplátu til sølu fyri 700 kr.
Tlf. 448055

SOFABORÐ
brúkt, teak 135 x 80, til sølu fyri 250 kr.
Tlf. 317114

STÓRT
ovalt spísiborð við tveimum plátum, myrkt beisað, sær út sum nýtt. Fæst fyri 1.000 kr.
Tlf. 311670

TIL SØLU VEGNA FLYTING
Dupult frystiskáp, vaskimaskina, furu køksborð við fimm stólum, gongskommoda við spegli, reolir, sofaborð o.a.
Tlf. 315243

TVÆR HVÍTAR
sovibrúkir við skuffum, til sølu fyri 100 kr. stk.
Tlf. 319604

UNGDÓMSSOFA
Ungdómssofa við hyndum, stólur + svart borð til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 318428

VASKIMASKINA
Vølund Quattro 444, til sølu vegna flyting.
Tlf. 319912

Leikur

MARANTZ
SD45 båndoptager, marantz EQ 551, 2 x 10 bånds grafisk equalizer. 2100,-
Tlf. 319868

PLAYMOBIL
leikur ynskjast til keyps.
Tlf. 315780
aftaná kl. 17

Pløgg

BRÚÐARKJÓLI TIL SØLU
Sera vakur brúðarkjóli av slagnum Lilly við øllum tilhoyri. Dýrasta modellið fyri árið 99.
Tlf. 371340

KONFIRMATIÓNSKJÓLI
stødd 38, model Lilly, árg. 99, til sølu fyri 600 kr.
Tlf. 319486

KONFIRMATIÓNSKJÓLI
Lilly model stødd 34, skógvar stødd 36 og diadem til sølu.
Tlf. 448033, Toftir

SILVUR
til føroyska kvinnubúnan »Smæran« til sølu. Er lítið brúkt og sær út sum nýtt.
Tlf. 220295

Samband

SAMBAND
Eg eri ein maður mitt í 50 inum, og eg ynski at koma í samband við eina kvinnu, er hetta naka fyri teg so skriva til mín. Eg havi bil.
Bill. mrk. 804660